## Henrik verður fuppaður

Sjónvarpshyggjarar hjá 3+ sleppa í kvøld at mýkja láturvøddarnar, tá fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin verður gjørdur fyri gjøldur.

Saman við John "Faxe" Jensen er Henrik Larsen nevnliga eitt av offurunum, tá væl umtókta "Rent Fup" fer í luftina í kvøld.

Tær báðar donsku EM-hetjurnar taka lut í eini spurnarkapping, har vinningurin er ein ferð til Las Vegas. Mótstøðumenn eru onside-vertirnir, Carsten Werge og Per Friman. Men tað sum Stóri og Faxe ikki vita av, er at teir báðir sjónvarpsvertirnir hava eina avtalu við quiz-master, Jakob Kjeldberg.

Sendingin verður at síggja á 3+ klokkan 19.00 í kvøld.

**-mørk**




## Dómarin vildi ikki hoyra um racismu

Michael Winer, týskur fótbóltsdómari, er í øllum førum ein av teimum, sum veruliga vil gera nakað við trupulleikan við racistiskum rópum móti spælarunum. Leygardagin spældu Aachen og Gladbach í Bundesliguni við Weiner sum dómari. Heimaáskoðararnir róptu støðugt háandi róp móti Kahé hjá Gladbach. Weiner gjørdi skjóta prosess, og so máttu áskoðararnir finna seg í, at eingin dystur varð spældur á hesum sinni. Nýggjur dystur verður ásettur, og so fæst at vita, hvørt áskoðararnir til ta tíð duga sær betri hógv.

**-mørk**

Skála-KÍ 0-3 (0-2):

# KÍ fann klæðini aftur

**Eftir at teir vórðu fullkomuliga úrlætnir í Havn, var støðan ein heilt onnur á Skála. KÍ er íletið bæði pulshosum, dýnujakka og langum undirbuksum undan seinnu hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið**




*Arbeiðsavrikið hjá KÍ var í hæddini, tá teir á útivølli smurdu Skála av. Her er Heðin á Lakjuni í nærdysti við Bjarna Jørgensen og Nenad Stankovic*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein dreymabyrjan, sum klaksvíkingar fingu á Skála í kvøld. Eftir bara seks minuttum hevði Símun Joensen stúta klaksvíkingar framum, og tá Paul Clapson sjey minuttir seinni sendi næsta bóltin í Skála-málið eftir sera vakurt álop, lá finaluluttøkan at kalla beint til høgra beinið.

### Skuldu vaskast

Framúr byrjanin hjá KÍ var kanska úrslit av avsmurninginum, sum liðið var fyri í Gundadali sunnudagin. Í øllum førum tóktist tað, sum vóru menn heilt uppi í snúningum, nú stóra eyðmýkingin móti arvafiggindunum skuldi vaskast burtur.

Júst tann reaktiónin var uttan iva væntandi, og tí kundi tað undra, at vertirnir ikki vóru klárari enn tað sama, nú KÍ kom buldrandi við 200 km/t ferð. Ikki tí. Skála hevði kanska verið liðið, sum hevði bóltin meira hesa fyrstu løtuna, men tað var munur á, hvør vilji og intensitetur var í spælinum, tá liðini hvør í sínum lagi høvdu vunnið bóltin.

Skelkurin varð tó sodnaður so líðandi, og Skála tók so við og við alt meira yvir á vøllinum. Hugburðurin gjørdist sum fráleið alt betri, og meðan gestirnir dúvaðu upp á kontra, trýsti Skála av øllum alvi fyri málinum, sum aftur kundi skapa spenning.

At KÍ so samstundis fall í klassisku felluna at detta ov langt aftur, gjørdi ivaleyst eisini støðuna spentari enn neyðugt. Hóast teir ta einu ferðina høvdu góðan kontra-møguleika, so var tað ein stórur trupulleiki hjá KÍ, at liðið sakk somikið djúpt. Snøgt sagt, so var vegurin niðan eftir vøllinum ov langur í kontrafasuni, og tí gjørdist talan mest sum einvegis ferðslu seinasta korterið unndan steðginum.

### Liðavrik

Við at hvør maður alla tíðina gav alt fyri liðið, eydnaðist tó at hóra undan trýstinum, og eftir steðgin tóktist greitt, hvar sigurin skuldi enda. Tony Paris hevði snarað knarvanum á liðnum somikið, at KÍ nú í nógv størri mun megnaði at standa rætt, heldur enn at klumpa seg í brotsteiginum. Og tá Skála í steðginum hevði skifti Paula G. Hansen út, misti teirra miðvøllur samstundis stóran part av momentinum, sum støðugt hevði trýst bóltin á KÍ-hálvuna.

Gaman í vóru klaksvíkingar fyri tað nógva framvegis í verjustøðu. Men í mun til fyrra hálvleik, stóð slagið nú væl longur uppi á vøllinum. Símun Joensen, Hjalgrím Elttør og Heðin á Lakjuni arbeiddu við stórari orku, og samstundis gav tað meira frið yvir spælið, at garvaði og bólttryggi Christian Lundberg nú varð trektur longur aftur á vøllin.

Og við at flyta liðið hesar 10-15 metrarnar longur niðan, vóru fortreytirnar til kontra-spælið nú eisini munandi betri. Ofta skuldi bara ein ella tvær sendingar til, áðrenn KÍ hótti mótstøðumálið, og eitt mál til 0-3 var nú eins upplagt, sum eitt til 2-1 var tað.

Triðja málið kom tó ikki, fyrr enn 10 minuttir undan leikloki, tá Hjalgrím Elttør setti krúllin á enn eitt vakurt kontra. Kanska eisini hóskandi, tí sami Elttør mundi við góðari grund kenna seg snýttan, tá hann ikki fekk brotsspark, tá hann rann langa sending upp, áðrenn hann inni í brotsteiginum varð sópaður niður aftanífrá.

### Europa er heilt nær

0-3- á heimavølli ber uttan iva við sær, at Skála er at kalla liðugt í steypakappingini. Og upp á sín hátt merkir tað eisini, at tað nú helst er so sum so við motivatiónini tað, sum eftir er av kappingarárinum sum heild. Sjálvandi skal skinnið ikki seljast, fyrr enn bjørnin er skotin, og tað eru helst fáir klaksvíkingar, sum vilja kanna sær bitan longu nú, soleiðis sum KÍ-avrikini á heimavølli hava sveiggjað. Hesa ferð er tó eingin stevna ella festivalur, sum kann spilla spælið í so máta, og við úrslitinum í hinari hálvfinaluni í huga, er lítið at ivast í, at bara finaluplássið í sjálvum sær er ein heilt stór gularót. Hetta kann nevnliga vísa seg um »fríbillett« út í Europa, um EB/Streymur megnar at halda fast um sín fyrimun.

## Hava enn vónina

Hóast teir orangju-littu hingu við høvdunum, tá dómarin hevði blást av á Skála, fekst eingin váttan fyri, at hetta var tað fyri teirra viðkomandi.

- sjálvandi verður tað trupult nú, men vit trúgva upp á møguleikan. Ein dystur er eftir enn, og tá teir kunnu vinna 3-0 her, kunnu vit væl gera tað sama í Klaksvík, segði Jónhard Fredriksen eftir dystin.

Men hann iðraði seg tó um, at teir høvdu givið klaksvíkingum somikið góð kort undan seinna dystinum.

- Teir fáa tvey kontra-mál mest sum alt fyri eitt, og so verða tað teir, sum seta dagsskránna. Serliga fyri steðgin trýsta vit nógv, men teir verja seg væl, og í øllum førum sleppa vit ikki nóg væl ígjøgnum verjuna hjá teimum. Og tað rinda vit so eisini prísin fyri í seinasta enda, helt Jónhard.

**-mørk**

## Liðavrik

Ein av málskjúttunum og stríðsmonnunum hjá KÍ, Símun Joensen, var sum vera man ovur fegin eftir trygga sigurin á Skála.

- Hatta var heilt ótrúliga gott hjá okkum 3-0 í eini hálvfinalu gevur okkum í øllum førum eitt sera gott útgangsstøði, og eftir tapið í Havn var hetta akkurát tað, sum vit høvdu brúk fyri.

Var tapið í Havn á sín hátt eisini viðvirkandi til góða avrikið hesaferð?

- Tað var tað helst. Vit vildu fyri alt í verðini reisa okkum aftur, og sum so var hetta kanska meinlíkt støðuni, sum HB var í seinasta sunnudag. Tá gekk tað út yvir okkum, meðan tað hesa ferð var Skála, sum fekk sekkin.

Símin helt annars, at teir fyri steðgin høvdu verið dekan ov bangnir, eftir at teir høvdu skotið tvey mál.

- Vit detta helst ov langt aftur, og tí verður trýstið øgiligt eina góða løtu. Eftir steðgin fáa vit tó rættað upp á hetta. Og tá vit so skora til 3-0, er at kalla leyst og liðugt.

Somikið leyst og liðugt, at finaluplássið nú er tryggjað?

- Tað tørt tú meg ikki at siga. Vit hava jú akkurát tapt við fleiri enn trimum málum, so vit skkulu framvegis arbeiða hart. Tað gjørdi alt liðið í dag, og tað er eisini tann hugburðurin, sum vit skulu hava við okkum, tá vit spæla seinnu hálvfinaluna, staðfesti Símun.

**-mørk**